

# Báta og kamping treff í Runavík

**Bátarnir hittast út fyri Saltnes fríggjakvøldið kl. 18, meðan kampingbilar/vognar sleppa inná økið kl. 18.30.**

**Ætlanin er enn einaferð at skipa fyri hugna á havnarlagnum í Runavík, har ymisk felagstiltøk verða fyriskipað inni í teltinum, sum verður sett upp á staðnum.**

**Hini árini hevur hetta eydnast framúr væl, serliga væl í 2009. Og nú vóna fyrireikararnir at tiltakið verður líka væl vitjað sum síðsta ár.**

**Alt parkeringsøkið við síðuna av teltinum verður sett av til kampingvognar og kampingbilar. Her kunnu kampistar nýta økið. Tó er avmarkað pláss.**

**Atgongd er til streym bæði til vognarnar og til bátarnar (Tallykey)**

**Atgongd verður til vatn á økinum, til toilett, og atgongd til brúsu í ítróttarhøllini leygardagin frá kl. 10 til 12.**

**Nógvur góður tónleikur verður eisini at hoyra, karnivalur at síggja og alt møguligt at uppliva.**



# 20 tiltøk í juni

**- Tað er við gleði, at Mentanarhúsfelagið eisini til hesa Eystanstevnuna kann vísa á ítøkilig úrslit í samband við at útvega okkara nærumhvørvi ein mentanardepil.**

Mentanardepilin við Løkin í Runavík er vorðin veruleiki við Løkshøll og hevur longu virkað í eitt ár, har hópin av tiltøkum hava verið.

Byrjað varð longu í mai 2009, sjálvt um tøkniliga útgerðin ikki var komin uppá pláss. Eftir summarsteðgin byrjaðu tey aftur og hava 23 tiltøk verið í Løkshøll, har um 6.000 fólk hava vitjað.

– Longu í ár eru dupult so nógv tiltøk á skránni og alsamt fleiri koma afturat, verður sagt.

Fram til endan av juni eru fleiri enn 20 tiltøk á skránni, so stórar vónir eru settar fyri árið.

– Skoðsmálini frá teimum, sum hava verið í Løkshøll síðani vit byrjaðu fyri einum ári síðani, hava verið sera positiv og givið ábendingar um, at vit eru á rættari leið.

Vælumtókta stevnukabarettin verður aftur partur av Eystanstevnuni við hópin av tilfari til gaman og álvara – tó mest bert til gaman.

– Bólkurin, sum fyriskipar kaberettina hevur vant í eina tíð og hava latið okkum vita, at vit skulu vænta eina góða og stuttliga kaberett í ár, har lokala umhvørvið fær sítt.

Nevndin í Mentanarhúsfelagnum er í dag mannað soleiðis: Kári Thorsteinsson, formaður; Hans Tausen, næstformaður; Doris Djurhuus, skrivari og Eyðun Gaardbo.




